VIÐMERKINGAR

Latið fakfeløgini yvirtaka Føroya Lívstrygging - so kunnu tey skipa teirra egna pensjónskassa

Hans Pauli Strøm
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Tað er ikki bara viðvíkjandi ætlaðu eftirlønartryggingini, at landsstýrissamgongan gongur beinleiðis ímóti fakfeløgunum. Tí tað sama er skilið viðvíkjandi royndunum hjá fakfeløgunum at yvirtaka Føroya Lívstrygging, sum teirra limir frammanundan eiga meginpartin av.

Í summar avgjørdu feløgini so at leggja sak móti landsstýrinum fyri ólógliga ognartøku, tá landsstýrið tann 1.1.2000 gjørdi sjálvognarstovnin Fø. Lívstrygging til alment partafelag. 500.000 kostaði tað landsstýrinum at ognartaka Fø. Lívstrygging, ið umsitur eina samanlagda uppsparing uppá 948 mió. kr.

Hetta varð samtykt í øgiligum skundi í løgtinginum beint uppundir jól 1999. Javnaðarflokkurin vildi tó ikki taka undir við hesum - vit hildu ikki at greiða var um ognarviðurskiftini – vit hildu ikki at landsstýrið kundi taka eina ogn, sum tað ikki átti, og gera hana til partafelag við sær sjálvum sum einaeigara.

Óloglig ognartøka av Lívstryggingini

Og í vár vísti tað so seg, at landsstýrið gjøgnum landsstýrisins meiriluta hevur framt eitt tjóvarí av sjálvognarstovninum Fø. Lívstrygging, har tað eru tryggingartakararnir, tvs. fyri tað mesta løntakararnir og limirnir í fakfeløgunum, sum eiga rættin til øll aktivini í felagnum. Hetta varð nevnliga staðfest av advokati og sjálvum táverandi fíggjarstjóranum í Fø. Lívstrygging (t.e. núverandi stjóranum), í skrivi til Fø. Landsstýri longu í okt. 1997 – eitt avgerandi skriv, sum Landsstýrið tó »gloymdi« at lata løgtinginum undir viðgerðini av málinum, og sum tí ikki kom undan kavi fyrr enn einaferð í vár.

Í hesum skrivi verður staðfest: »Hildið verður ikki at tað ber til at umskipa Føroya Lívstrygging sum sjálveigandi stovnur til partafelag«. Og »Niðurstøða: Vísandi til omanfyri standandi verður mett, at Føroya Lívstrygging er sjálveigandi stovnur, at tryggingartakarin hevur rætt til øll aktiv, sum eru í Føroya Lívstrygging, at umsitingin av Føroya Lívstrygging kann verða avhandað fyri pening«.

Semja var um yvirtøkuna, men landsstýrið sveik

Fakfeløgini, hvørs limir eiga meginpartin av aktivunum í Lív (feløgini siga 80%, landsstýri sigur 49,6%), stevna nú landsstýrinum, tí tey í langa tíð til fánýtis royndu at samráðast um eina semju við landsstýri og Lív, um at yvirtaka og keypa Fø. Lívstrygging. Í veruleikanum var man komin so langt í vár, at semja var millum allar partar.

Høvuðstátturin í semjuni var, at løntakarafeløgini skuldi yvirtaka Lív saman við Tryggingarfelagnum Føroyar, soleiðis at fakfeløgini skuldu sita við 51% og Tryggingarfelagið við restini. Síðani skuldi tann parturin, sum hevur eftirlønaruppsparingarnar hjá feløgunum, skiljast burturúr. Hendan partin skuldi fakfeløgini vegna limirnar eiga 100%. Hin parturin, lívstryggingarnar, skuldi so Tryggingarfelagið eiga og reka.

Men so hendir tað knappliga í juni í ár, at landsstýri, sum skal góðkenna hesa semjuna, gongur frá øllum. Feløgini sleppa ikki at yvirtaka Lív. Men hvat bjóðar landsstýrið teimum í staðin? Jú, tey kundu sleppa at fáa 1 umboð í nevndina – onki annað !!!

Hetta var sjálvandi ein so stór provokatión móti feløgunum, at tey nú hava stevnt landdstýrinum fyri ólógliga ognartøku.

Øll fakfeløgini mugu vera við í yvirtøkuni

Javnaðarflokkurin tekur fult undir við sjónarmiðunum hjá fakfeløgunum: Landsstýrið eigur beinanvegin at taka samráðingarnar uppaftur við fakfeløgini, rudda misskiljingar av vegnum, og fáa lív aftur í ta semjuna við fakfeløgini, sum var innanborða. So sleppur landsstýrið eisini undan einum óvirðiligum slagsmáli við fakfeløgini í eini drúgvari rættarsak.

Hinvegin haldi eg eisini, at hesi fakfeløgini, sum eiga eftirlønarskipanir í Lív, eiga at fáa hini fakfeløgini, sum standa uttanfyri Lív, fyrst og fremst Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, við í arbeiði við ætlanunum um at yvirtaka Lív. Tí øll feløgini eiga at vera saman um hetta, so at Lív kann umskipast til teirra egni felags pensjónskassa, ein pensjónskassa, sum fevnir um allan arbeiðsmarknaðin.

Nýggj lóggáva um eftirlønaruppsparing

Ætlanin at yvirtaka Lív kann eisini vera strategisk fyri at kunna skapa møguleikar hjá teimum feløgum, sum bert vilja hava samhaldsfastar eftirlønargrunnar, men sum verða forðað av hesum av verandi tryggar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Verður Lív yvirtikið av feløgunum og umskipað til tann sentrala pensjónskassan á arbeiðsmarknaðinum, ber til at gera nýggja lóggávu um eftirlønartryggingar, sum ikki forðar feløgunum at skipa sínar eftirlønaruppsparingar so sum tey sjálvi vilja.

Ætlanin um at fakfeløgini yvirtaka og gera Lív til teirra felags pensjónskassa, passar eisini sum fótur í hosu til eina nýggja heildarætlan fyri alt pensjónsøkið: nevnliga eina skipan, ið byggir á 3 súlur:

- fólkapensjónin
- samhaldsfasta eftirlønin, sum saman við fólkapensjónini skal verða á so høgum støði, at ein rímilig grundpensjón til allar borgarar verður tryggjað.
- eftirlønaruppsparingar, sum hvørt felag skipar fyri sínar limir, alt eftir møguleika og tørvi.

Hvat er støðan hjá hinum flokkunum?

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni spurdi eg eftir, hvørja støðu hinir flokkarnir høvdu til hetta málið, men fekk ikki rættiliga nakað svar. Eitt er, at flokkarnir ikki eru á einum máli um eina generella eftirlønarskipan fyri allan arbeiðsmarknaðin, men fyri tað kunnu teir hava eina meining um, at fakfeløgini vilja sleppa at yvirtaka og gera Føroya Lívstrygging til teirra egna pensjónskassa. Tað kann ikki bera til, at ein fólkafloks landsstýrismaður skal sita og ráða (og forða?) fyri hesum.

Feðgar á ferð

Dan R. Petersen,
javnaðarmaður

Eg eri í øðini, í øðini inn á Helga Jacobsen í útvarpinum og Øssur Winthereig og Brynhild Thomsen í sjónvarpinum. Kjartan Hoydal havi eg onga virðing fyri.

Helgi Jacobsen leiðir eina samrøðu millum Kjartan Hoydal og løgmann. Kjartan kemur lotur og skammfuktaður í telefonina (tað hevði hann jú alla grund til), men fær hann eftir fáum sekundum snarað prátið inn á dagsins politikk. Evnið í e-mailinum, undirgrundarvirksemi, bleiv als ikki viðgjørt. Antin miðvís planlegging av Helga Jacobsen ella meira amatøraktugt enn loyvt er. Í øllumførum skammiligt.

Og síðani sjónvarpið. Øssur setur Kjartani 2-3 einkisigandi spurningar, og síðani leggur Brynhild Thomsen sum ein óløgi í krovið á løgmanni. Og tá innslagið er av, stendur løgmaður eftir sum ein flongdur smádrongur, sum ongantíð fekk orðið fyri seg. Hetta er føroyskur journalistikkur!

Fyri ein ordans skyld skal eisini sigast, at tjóðveldispolitikkarin, Leivur Hansen, var vertur fyri »Degi og Viku« hetta kvøldið.

Men sjálvandi hevur tað týðning longu nú at gera seg væl við komandi sjónvarpsstjóra, sum jú eisini er ein av Kjartansa »pennavinum«.

Tað sum málið snýr seg um, og sum als ikki kom fram í sendingunum hoskvøldið, er, at ein toppembætismaður gjøgnum mong, mong Harrans ár og pápi varaløgmann skrivar til nakrar lyklapersónar og bjóðar seg til at fabrikera lesarabrøv, sum onnur so kunnu umskriva og senda bløðunum. Hvussu mong ófantalig lesarabrøv man Kjartan eiga higartil, og sum aðrir hava undirskrivað?

Eitur nakar greinskrivari Vágfjall, Persson, Úlvsá o. s. fr? Ella er hetta pseudonym fyri ein feitan eiturkopp, sum situr niðri í London og togar í tær nationalistisku træðrirnar í Føroyum?

Og síðani eggjar Kjartan til mótmæli móti løgmansins politikki, sum jú eisini Tjóðveldisflokkurin hevur givið seg undir – í øllum førum á pappírinum.

Hvussu man sonur Kjartan Hoydals hava tað, táið hann hyggur í eyguni á løgmanni, um hann torir? Hentur pápi at hava, tað má sigast.

Føroya fólk kennir nú slagið og veit, hvat tað skal kempa ímóti. Í so máta kom tað væl við at »verðinsmaðurin« Kjartan Hoydal so fullkomiliga skeit í dansin.

Og síðani skal bara leggjast afturat, at Gud náði okkum fyri fullveldinum, táið tann almenna pressan longu nú tykist líka einsrættað sum tann hjá Slobotan Milosowich á sinni.

Nú er panikkur í monnum

Helena Dam á Neystabø
Sjálvstýrisflokkurin

Nú sær út til, at loysnin í sjálvstýrismálinum er í eygsjón. Hvønn einasta dag fáa vit prógv fyri, at semjan um at gera eina yvirtøkuætlan, og semjan um at gera Føroyar leysar av donskum pengum – eftir einari fastari ætlan frá nú av og fram til ár 2012 – er ein ætlan, sum ber fram á mál. Ein semja sum m.a. vit í Sjálvstýrisflokkinum løgdu alla okkara orku í at røkka tíðliga í vár, tá ið samgongan, sum øll minnast, hekk í einum klønum tráði. Ein semja, sum er samtykt í Løgtinginum.

Skjøtul er longu settur á tær fyrstu yvirtøkurnar, og vit hava boðað frá, at blokkstuðulin skal minka longu næsta ár.

Gøtan er greið – og tað fara bara at vera trupulleikar her heima í Føroyum, sum av álvara kunnu oyðileggja okkum ætlanina. Øll vita, at hetta er ein stór uppgáva, hon tekur tíð, krevur hegni og fram um alt er tað neyðugt, at vit alla tíðina leggja orku í at skapa semjur og ikki sum nú stríð og ósemju.

Sjálvandi fara vit at møta mótgangi og forðingum – men tær eru allar til at vinna á.

Men nú er panikkur í monnum. Nú ræður um fyri alt í verðini, at skapa totalan forvirring, og at finna ósemjur, har einki grundarlag er fyri ósemju. Við tí eina endamáli, at fáa fullveldisætlanina at bróta saman. Tað miseydnaðist í vár hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum. Tað má heldur ikki eydnast hesuferð.

Nú samtakið Hesuferð ætlar at samskipa eitt álop móti arbeiðinum, at føra Løgtingssamtyktina um Sjálvstýri Føroya Fólks út í lívið, kann tað bara føra til so stóra spjaðing, at fullveldisætlanin fer fyri bakka. Tað sama kann sigast um øsingina hesa seinastu tíðina um ymsar strategiir í fullveldismálinum, um búskapargrunnin, um samráðing við danir ella totala konfrontatión – alt hetta hevur bert eittans endamál, at forkoma sjálvstýrisverkætlanini.

So einfalt er tað. Tað eiga øll at duga at síggja. Og fer tað at eydnast løgmanni og varaløgmanni – tjóðveldisflokkinum og fólkaflokkinum at forkoma sjálvstýrisverkætlanini, ja so hava teir báðir uppiborið at fingið ein danskan riddarakross.

Lat okkum fyri alt í verðini ikki forkoma hesum søguliga møguleika at halda fast um eina ætlan, sum ber á mál, og sum allir føroyingar kunna kenna seg tryggar við.

listastevna føroya 2001

Teitur á ferð og fløgu

Teitur Lassen hevur nógv jørn í eldinum úti í heimi. Men júst nú vitjar hann listastevnuna og hevur eisini givið út stakfløgu

listastevna føroya 2001

Dagfinn Olsen
Mynd: Jens Kristian Vang

Teitur Lasen spælir á Listastevnuni saman við Eivør Pálsdóttir, men eisini sum einstaklingur við egnum bólki.

Teitur var hóskvøldið í Trongisvági og leikti. Hóast ov langt var milum teirra, ið leitaðu sær at lurta, so sigur Teitur, at sera hugnaliigt var at leika og at talan var um eitt gott kvøld.

Teitur leikar sum einstaklingur, tó ein konsert er, har Eivør Pálsdóttir er við á palli.

Við sær hevur Teitur tveir danskar tónleikarar, umframt føroyska guitarsnillingin Leiv Thomsen.

Teitur fegnast um at hava ein bólk við, eftir at hann seinnu tíðina hevur verið nógv á palli einsamallur.

Fløga

Teitur var í vetur í Føroyum í 3 mánaðir. Umframt farmførslur, fekk hann stundir at fara í upptøkuhøliini hjá Jákupi Zacahriassen - JakZac studio.

- Hetta var gott, tí so fekk eg gjørt okkurt skilagott, meðan eg var heima. Eg fekk hetta pakkatilboð frá Jákupi, ið hevur studio og ReproZ. Talan er um stakfløgu. Tað primera vóru upptøkurrnar, ikki útgávan, men táð varð hildið gott hugskot at geva út. Og so havi eg eisini okkurt, ið eg kann brúka til promotion, - fløgur at hava við, tá eg eri úti og spæli, sigur Teitur.

Á fløguni eru mong góð nøvn handan ljóðføri og knøttar: Rógvi á Rógvu, Jan Zachariassen, Regin Guttesen, Magnus Johannesen, Jákup Zachariassen, Óli Poulsen, Brandur Jacobsen, Torkil Johannesen og Mikael Blak.

Út aftur í heim

Longu mánadagin fer Teitur av landinum aftur. Hann skal taka tónleik upp í Nashville og í Los Angeles, umframt at hann skal leika ymisk stød.

Teitur Lassen vitjar við donskum tónleikarum. Umframt spælur Leivur Thomsen við

Caput

Gúdni Franzen er ein av monnunum aftan Caput og hann er maður Láru Stefansdóttir, ið dansar ballet og er eisini við har.

Bólkurin Caput fer á Listastevnuni at spæla føroysk tónleikaverk

listastevna føroya 2001

Dagfinn Olsen
Mynd: Jens Kristian Vang

Íslendski bólkurin Caput skal á Listastevnuni spæla verk eftir føroyskar tónasmiðir. Talan er um Blak, Bogason og Rasmussen, umframt eitt íslendskt stykki og eitt danskt.

Bólkurin hevur sum mál at spæla nýggj verk. Caput byrjaði í 1987 og hevur ferðast nógv. Bólkurin hevur eisini vitjað í Føroyum fyrr.

Ein partur av bólkinum skal í næstum leika í Kina.

Bólkurin hevur givið nógv verk út á fløgu, og m.a. verður nú arbeitt við tónleiki hjá Sunleif Rasmussen, sum Caput spælir inn fyri forlagið svenska BIS.

15 fólk eru við bólkinum, 16 við solisti, ið hesaferð verður Jóannes Andreassen, og eisini verður Ólavur Jacobsen solistur.

Gúdni Franzen er ein av monnunum aftan Caput og hann er maður Láru Stefansdóttir, ið dansar ballet og er eisini við har.

Tróndur Bogason, Kristian Blak og Jóannes Andreassen